# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingur til Útistovu (B3)

Eitt avloysarastarv fyri sjúkrarøktarfrøðing í barnsburðarfarloyvi á starvsbrøki 0,85 er leyst at søkja til setan 1. desember 2008 til og við 31 juli 2009.

B3 er ein starvsstova við ymiskum sergreinum undir Skurðdeplinum, sum eru: Gynækologoi/Obstretik, Almenn kirurgi, Ortopedkirurgi, Urologi og Dagskurðdeild.

Aðrar funksjónir eru: forkanningar innan skurðviðgerðir, eftirviðgerðir, eftirlit, smærri skurðviðgerðir, aðrar kanningar og ráðgeving.

Útistova flytur í nýggj, nútímans høli - B3 - á Landssjúkrahúsinum.

**Førleikakrøv**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakliga vitan innan økið
- kliniskar royndir við kirurgiskari sjúkrarøkt og viðgerð
- góð samstarvsevni
- kann arbeiða sjálvstøðugt

Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú ringja til Birtu Weihe, deildarleiðara á tlf. 304500, lok. 5400, t-post: lsbirwe@ls.fo ella til Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lok. 5102, t-post: lsnaitu@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 20. oktober 2008 kl. 12.00**

## Sálarfrøðingur til Psykiatriska depilin

Eitt fulltíðar avloysarastarv leyst at søkja hjá kliniskum sálarfrøðingi til setan 1. november 2008 ella eftir nærri avtalu og eitt ár fram.

Arbeiðsøkið umfatar kanningar og viðgerð, samskipan, tílsýn á somatiskum deildum, ráðgeving, undirvísing og supervisjón í einum størri tvørfakligum viðgerðartoymi. Á deplinum starvast 4 sálarfrøðingar.

**Vi leggja dent á:**
- at tú hevur góð samstarvsevni, ídni, hug og dirvi til at luttaka í einum sera fjøltáttaðum diagnostiskum og viðgerðarligum arbeiði saman við øðrum fakbólkum
- at tú kanst arbeiða ábyrgdarfult og sjálvstøðugt
- at tú hevur førleikar og royndir í at standa fyri kanningum og viðgerðum av fólki við sálarligum trupulleikum

**Fyrimunur er, um:**
- tú hevur autorisatión, sergrein í kliniskari psykologi og góðkendur supervisor
- tú skilir, tosar og skrivar føroyskt

Kandidatar uttan autorisatión kunnu eisini søkja

**Vi kunnu bjóða**
- nógvar áhugaverdar og fjøltáttaðar arbeiðsuppgávur
- eitt áhugavert og gott arbeiðsumhvørvi í menning
- tvørfakligt umhvørvi
- nógvar eldsálir, ið brenna fyri sakini
- góðar møguleikar fyri upplæring og luttøku á fakligum skeiðum

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Tormóð Stórá, leiðandi yvirlækna, á tlf. 304500, lok. 4100, t-post: lstost@ls.fo ella til Annu Debes Hentze, virkandi leiðandi sálarfrøðing, tlf. 304500, lok. 4175, t-post: lsannhe@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 28. oktober 2008**

## Læknaskrivari til Medisinska depilin

Tvey føst fulltíðarstørv eru leys at søkja til setan 1. november 2008 ella eftir avtalu.

**Førleikakrøv:**
- útbúgving sum læknaskrivari
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur
- teldukunnleiki

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja til Sæunn Ólavsdóttir Hansen, leiðsluskrivara á tlf. 304500, lok. 6103.

**Umsóknarfreistin er 20. oktober 2008 kl. 12.00.**

## Sálarfrøðingur til Psykiatriska depilin

Søkt verður eftir kliniskum sálarfrøðingi til eitt fast fulltíðarstarv til setan 1. november 2008 ella skjótast tilber. Talan er um eitt starv, ið serliga fevnir um kanningar og viðgerð av børnum og ungum. Í løtuni starvast 4 sálarfrøðingar á deplinum.

Sálarfrøðingurin kemur at arbeiða sum partur av einum barna- og ungdómspsykiatriskum toymi, sum er samansett av: musikkterapeuti, psykiatriskum sjúkrarøktarfrøðingum, skrivara og konsulentum við serkunnleika innan barna- og ungdómspsykiatri, ið vitja nakrar vikur um árið. Sum partur av barna- og ungdómspsykiatriska toyminum fært tú møguleika fyri at verða við til at upp- og útbyggja verandi tænastuna, ið er eyðkend við sínum umfatandi ambulanta virksemi. Ætlanin er at gerast ein verulig barna- og ungdómspsykiatrisk eind. Sálarfrøðingurin skal verða partur av tí psykiatrisku-, sálarfrøðiligu- og sosialu útgreining av ávístu børnunum og teimum ungu, og eisini vera partur av tí ráðgeving, viðgerð og samstarvi, ið eru neyðug, bæði við atliti til barnið/tann unga sjálvan, familju og onnur av týdningi, umframt almanna- og skúlaverkið, kommunulæknar og aðrar myndugleikar.

Psykiatriski depilin á Landssjúkrahúsinum er fyri alt landið og hevur 55 seingjarpláss við umleið 300 innleggingum árliga. Harumframt er dagdeild og stórt ambulant/økispsykiatriskt virksemi. Psykiatriski depilin hevur eisini tilsýnstænastu á øðrum sjúkrahúsdeildum umframt ávísa embætisskyldu úteftir, t.d. mentalobservatiónir o.a.

**Førleikakrøv:**
- cand. psyk. ella líknandi útbúgving við serkunnleika í kliniskari sálarfrøði við autorisatión og supervisjónsførleika
- hava hug til at vera við til at menna barna- og ungdómspsykiatriska arbeiði
- royndir við sálarfrøðiligum kanningum og psykiatriskari útgreining av børnum og ungum
- barna- og ungdómspsykiatriskar royndir
- tvørfaklig samstarvsevni, ídni og áhuga
- royndir við at fremja sjálvstøðugt psykoterapeutiskt arbeiði
- fyrimunur er, um tú skilir, tosar og skrivar føroyskt
- kandidatar uttan autorisatión kunnu eisini søkja

**Vit kunnu bjóða tær:**
- eitt áhugavert arbeiðsøki í menning
- tvørfakligt samstarv í einum ágrýtnum og eldhugaðum barna- og ungdómspsykiatriskum toymi
- møguleika fyri viðkomandi skeiðum og fakligari kvalifisering við serkunnleika í barna- og ungdómspsykiatriskum arbeiði
- supervisjón er sjálvsøgd

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til leiðandi yvirlækna, Tormóð Stórá á tlf. 304500, lok. 4100, t-post: lstost@ls.fo ella til virkandi leiðandi sálarfrøðing, Annu Debes Hentze, lok. 4175, t-post: lsannhe@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 20. oktober 2008**

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo